**Nr. 36/2015**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um bíðitíð til skurðviðgerð fyri ryggtrupulleikar, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Sirið Stenberg, (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Hvussu long er miðal bíðitíðin at fáa skurðviðgerð fyri diskusprolaps ella líknandi ryggtrupuleika?

2. Hvussu nógvir føroyingar verða árliga skurðviðgjørdir fyri nevndu ryggtrupulleikar?

3. Hvussu nógvir av hesum verða árliga sendir til Danmarkar at skurðviðgerast?

4. Verða hesir sendir til Ríkissjúkrahúsið til viðgerðar ella onnur sjúkrahús?

5. Hvussu nógvir føroyingar árliga verða skurðviðgjørdir á privatsjúkrahúsum, og er talan um samstarv við eitt ella fleiri?

6. Um bíðitíðin til skurðviðgerð gerst so long, at sjúklingar velja sjálvir at søkja sær hjálp á donskum privatsjúkrahúsi, kunnu hesir so fáa útreiðslurnar endurgoldnar samsvarandi kostnaðinum fyri almenna viðgerð?

7. Um ikki, hví?

**Viðmerkingar**
Pína í rygginum ger ofta fólk óarbeiðsfør, samstundis sum lívsgóðskan versnar og gerandisdagurin verður ein avbjóðing.

Tá fólk í besta blóma og í arbeiðsførum aldri verða rakt av slíkum heilsutrupulleikum er altavgerandi, at hesi fáa hjálp skjótast gjørligt. Gongur ov long tíð áðrenn viðgerð, kann heilsuskaði og fíggjarligt óføri standast av hesum.

Tað er tí alneyðugt, at nærum eingin bíðitíð er til skurðviðgerð, ella at hendan er so stutt sum gjørligt. Skjótari sjúklingurin fær heilsubót, tess fyrr kemur hann aftur til arbeiðis og samfelagið fær sín part av vinninginum.

Um tað verður staðfest, at persónur við nógvari pínu má skurðviðgerast, er tað sera óheppið, at hesin skal bíða í vikur og mánaðir eftir at sleppa framat.

Somuleiðis er mær komið fyri oyra, at um ein sjúklingur, sum bíðar eftir skurðviðgerð, leitar sær heilsubót á privatsjúkrahúsi við sjálvur at gjalda kostnaðin, ikki fær eitt oyra endurgoldið.

**Á Løgtingi, 30. mars 2016**
Kári P. Højgaard